# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Øssur Mohr í Herning og Keypmannahavn



*Øssur Mohr, listamaður, verður við á framsýningini »Art Herning« í Herning, og 17. februar letur hann upp eina framsýning í »Galleri Sct. Gertrud« í Keypmannahavn*

**Føroyski listamaðurin Øssur Mohr verður við á framsýningini »Art Herning«, sum í Herning í døgunum 26. - 28. januar, og leygardagin 17. februar letur hann upp eina framsýning nýggja gallarínum hjá »Galleri Sct. Gertrud« í Keypmannahavn**

LIST

Framsýningin »Art Herning« verður í Herning Kongrescenter í døgunum 26. - 28. januar 2007. Føroyski listamaðurin Øssur Mohr úr Fuglafirði verður við á hesi framsýningini á básinum hjá gallarínum Sct Gertrud við fleiri heilt nýggjum málningum.

Øssur letur sjálvur upp eina framsýning í nýggja gallarínum hjá »Galleri Sct. Gertrud« í Keypmannahavn (Knabrostræde 1A) leygardagin 17. februar. Ferniseringin verður frá kl.13-16, har Stanley Samuelsen syngur og spælir.

Opið er týsdag – fríggjadag frá kl. 14 - 17.30, leygardag frá kl. 11-14.

## Skeið í motivatión av hvølpum

**Síðst í januar byrja skeið í hvølpamotivatión. Trý skeið verða hildin ávikavist í Tórshavn, á Toftum og í Klaksvík**

HUNDAR
*Steintóra Joensen*



Eigarar, ið hava hvølp ímillum tríggjar og seks mánaðir, hava møguleika uppá ein jaligan og stuttligan máta, at læra og venja saman við hundinum.

Skeiðið er í umleið tríggir mánaðir, og í hesar tríggjar mánaðirnar lærir hundurin at umgangast aðrar hundar og fólk. Hvølpurin lærir eisini at koma, sita, standa og so framvegis.

Á Toftum verður byrjað mikudagin 24. januar, í Havn hósdagin 25. januar, og í Klaksvík verður byrjað leygardagin 27 januar.

Eisini ber til at venda sær til Hundaeigarafelag Føroya á tlf. 227317.

# Trý úr Vági í starvsvenjing

**Farnu tvær vikurnar hevur Steintóra Joensen úr 9. flokki í Vágs skúla verið í praktik á Sosialinum.**

**Hósdagin hitti hon tríggjar av floksfelagum sínum, sum vóru í Havn í somu ørindum**

STARVSVENJING
*Orð og myndir: Steintóra Joensen*



## – Stuttligt men strævið



Susan Poulsen frá Porkeri er 15 ára gomul, og gongur í 9. flokki í Vágs Skúla.

Hon er í starvsvenjing hjá Salong Viviann í Havn, og dámar sera væl. - Tað hevur verið stuttligt, men strævið, sigur hon.

Tá hon verður spurd, um hon møguliga kundi ætlað sær at verðið frisør, sigur hon, at tað kundi gott verið. Men hon hevur ikki hugsað so langt enn.

Aftaná 9. flokk ætlar Susan niður til Danmarkar á eftirskúla í eitt ár. So fer tíðin at vísa hvat hendir.

*Susan Poulsen ætlar sær á eftirskúla*

## – Ikki aftan fyri diskin



*Theis Herdalur ætlar at læra til verkfrøðing*

Theis Herdalur býr í Vági. Hann er 15 ára gamal, og gongur í 9. flokki í Vágs Skúla.

Hann er í starvsvenjing hjá Expert í SMS. Honum dámar væl og hevur haft tað stuttligt í tær tvær vikurnar.

Hann sigur tó, at tað verður nokk ikki hansara andlit ein kemur at síggja handan diskin í Expert framyvir.

Aftaná 10. flokk ætlar Theis sær nevniliga til Danmarkar at læra til verkfrøðing.

## Hevur lært nakað av deyvamáli



Lív Jákupsdóttir Ryggshamar frá Vági hevur verið í starvsvenjing á Deyvatulkatænastuni seinastu tvær vikurnar. Lív er 15 ára gomul, og gongur í 9 flokki í Vágs Skúla.

Hon sigur at hon fer heimaftur við einum góðum upplivilsi, og hevur fingið sera nógv burturúr.

Millum annað hevur hon lært eitt sindur av deyvamálið. Hon sigur at hon ætlar sær ikki at gerast tulkur, men vil fegin læra deyvamál.

Aftaná 10 flokk, fer hon møguliga á onkran musikkskúla. Annars ætlar hon at gerast sálarfrøðingur.

*Lív Jákupsdóttir Ryggshamar ætlar sær at gerast sálarfrøðingur*